LM-057/2022

Fylgiskjal 5a

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
110 Tórshavn

2023 01 25 - FMR hoyring KVSL

Tórshavn, hin 25. januar 2023

Viðvíkjandi uppskoti um broyting í løgtingslógini um skatting av kapitalvinningi

Víst verður til teldupost tykkara hin 11. januar 2023, har omanfyri nevnda lógarbroyting verður send til hoyringar.

Nevndin í FFG hevur gjøgnumgingið uppskotið og tekur sum heild undir við dagføringunum í mun til verandi lóg. Vit hava tó niðanfyri nevndu viðmerkingar.

Viðvíkjandi grein 1, nr 3– **Entry reglur**
Sambært uppskotinum er ætlanin at strika sokallaðu entry-reglurnar í kapittul 1b í kapitalvinningsskattalógini.

Kapittul 1b varð innsettur í kapitalvinningsskattalógina við løgtingslóg nr. 123 frá 9. desember 2016. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið (Lm 25/2016) var høvuðsendamálið at tryggja, at persónar, sum flyta til Føroyar, ikki verða dupultskattaðir av virðisbrævasølu. Tað framgekk tó eisini av viðmerkingunum, at ein sekundær jalig avleiðing av uppskotinum fór at vera, at tað fór at verða lættari hjá persónum at flyta til Føroyar. Í viðmerkingunum var m.a. sagt á síðu 3, at

"*...hugsast kann eisini,at uppskotið fær jaligar avleiðingar fyri landið, tí tað ger tað lættari hjá persónum at flyta til Føroyar*"

og at

"*Uppskotið hevur jaligar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, sbr. t.d. grein 10 í Norðurlendska tvískattasáttmálanum,og uppskotið tekur av marknaðarfordingar*"

Í fyriliggjandi uppskoti til strikan av entry-reglunum í kapittul 1b í kapitalvinningsskattalógini verður omanfyrinevnda sekundæra atlit ikki nevnt. Uppskotið til strikan av entry-reglum verður grundgivið við, at reglur í tvískattaavtalum umframt internar reglur í kapitalvinningsskattalógini altíð tryggja, at tvísskatting við sølu av partabrøvum ikki kemur fyri.

Viðmerkingarnar til uppskotið nevna tó einki um, at við hesum fara Føroyar at kanna sær rætt til at skatta inntøkur, sum eru vunnar uttanfyri Føroyar av persónum, sum einki tilknýti hava havt til Føroyar, tá ið hesar inntøkur vórðu vunnar. Hetta fer eyðsæð at virka sum ein forðing fyri, at persónar fara at flyta til Føroyar, og harvið í andsøgn vit eitt av endamálunum við entry-reglunum, soleiðis sum hesar vóru lagdar fram í 2016.

Viðmerkingarnar til fyriliggjandi uppskot grundgeva eisini við at nevna dømi um, at persónar við galdandi entry-reglum kunnu fáa ásett eitt høgt inngangsvirði, og eftirfylgjandi fáa staðfest eitt

skattligt tap, um virðisbrøvini verða selda fyri lægri virði. Hetta tap kann síðani nýtast til frádrátt í øðrum kapitalvinningsinntøkum við inntøkumissi fyri landskassan sum fylgja.

Hesin trupulleiki kann tó loysast á annan hátt, t.d. við at áseta, at tap ikki kann frádragast í kapitalvinningsinntøku í tann mun hetta tap stavar frá avhendingarupphædd, sum er lægri enn ásett inngangsvirði sambært § 2e í kapitalvinningsskattalógini. Líknandi regla finst frammanundan í § 28, stk. 5 í kapitalvinningsskattalógini.

Viðvíkjandi grein 1, nr. 4 – **Keyp av egnum partabrøvum**
Felagið fyri góðkendar grannskoðarar hevur ikki viðmerkingar til nýggju ásetingarnar í § 1, nr. 4 í uppskotinum, men vit skulu gera vart við, at kapitalvinningsskattalógin burdi innhildið reglu um, at feløg í sjálvum sær ikki skulu skattast við keyp og sølu av egnum partabrøvum. Víst kann verða til tílíka reglu í § 10 í donsku Aktieavancebeskatningsloven.

Viðvíkjandi grein 1, nr. 5 – **Arvur til persónar, sum búgva uttanlands**
Sum heild tekur felagið undir við hesum broytingum, vísandi til at talan er um at byrgja fyri einum holi í kapitalvinningsskattalógini.

Tó hava vit viðmerkingar til onkrar orðingar í uppskotinum.

Skotið verður upp, at tá ið virðisbrøv verður latin sum arvur til hjúnafelaga, arvingar ella legatar, sum ikki eru fult skattskyldug í Føroyum, ella heimahoyrandi í Føroyum sambært tvískattasáttmála, skal vinningur ella tap roknast upp í skattskyldugu inntøkuna hjá búnum.

Her burdi verið nágreinað, at tað er skattskylduga inntøkan hjá búnum eftir kapitalvinnings-skattalógini – um tað er tað ið meinast við.

Í hesum sambandi er eisini viðkomandi at spyrja, hvat deyðsbúgv rinda í kapitalvinningsskatti – 18% ella 35%, og nær deyðsbúgv yvirhøvur eru skattskyldug eftir kapitalvinningsskattalógini? Í heila tikið er kapitalvinningsskattalógin heldur ógreið í sambandi við skattliga viðgerð deyðsbúgvum:

- Í § 2 tykist framganga, at deyðsbúgv sum útgangsstøði ikki verða javnstillað við (likamligar) persónar.
- Í § 6, stk. 4 verður víst til deyðsbúgv og likamligar persónar.
- Í § 9 verða deyðsbúgv ikki nevnd, men greinin umrøður feløg, grunnar o.o.
- Í § 10 verður aftur víst til deyðsbúgv og likamligar persónar.
- § 14 verða deyðsbúgv ikki nevnd serstakt.
- Í § 15 verður bert víst til likamligar persónar.
- Í § 16 verður aftur víst til deyðsbúgv og likamligar persónar.
- Í rundskrivi nr. 2/2007 verður beinleiðis sagt, at deyðsbúgv eru juridiskir persónar.

Tað tykist greitt, at eitt deyðsbúgv er ikki at rokna sum ein likamligur persónur. Hinvegin er tað ógreitt, um eitt deyðsbúgv, har tað ikki beinleiðis verður sipað til deyðsbúgv í lógartekstinum, t.d. í § 9 og § 15, í staðin skal roknast sum "feløg, grunnar o.o.".

Um tað verður staðfest, at har deyðsbúgv ikki verða nevnd serstakt í lógartekstinum, skulu tey í staðin roknast sum "feløg, grunnar o.o", so fyriliggur eitt hol í lóggávuni, við tað at deyðsbúgv tá kunnu móttaka skattafrítt vinningsbýti (§ 9 og § 15 í kapitalvinningsskattalógini), umframt at arvur úr deyðsbúgvi (til persónar sum búgva í Føroyum) eisini er skattafríur (§ 29, nr. 3 í skattalógini).

Tilvísingin til tvískattasáttmálar í fyriliggjandi uppskoti kann eisini viðføra óhepnar støður. Tað ber væl til at hugsa sær, at, persónar við bústaði uttanlands kunnu hava fulla skattskyldu í Føroyum – t.d. sum lesandi ella tí at teir hava tøkan bústað í Føroyum – uttan at hesir persónar eru heimahoyrandi í øðrum landi sambært tvískattasáttmála, av teirri einføldu orsøk, at Føroyar ikki hava tvískattasáttmála við viðkomandi land, har persónurin hevur bústað.

Sum kunnugt hava Føroyar bert tvískattasáttmálar við heilt fáa lond í heiminum.

Hesin spurningur var eisini uppi at venda í sambandi við, at uppskotið um exit-reglur í kapittul 1a í kapitalvinningsskattalógini var sent til hoyringar í 2016. Tá var upprunaliga uppskotið broytt til núverandi lógartekst í § 2a í kapitalvinningsskattalógini, sum bert vísir til, um persónur gerst heimahoyrandi í Danmark, Grønlandi ella øðrum landi. Tvs. eingin tilvísing til fulla skattskyldu ella tvískattasáttmálar.

Lagt kann verða afturat, at tað tykist óneyðugt at nevna Danmark og Grønland serstakt í hesum sambandi. Í skattligum høpi eru Danmark og Grønland javnstillað við onnur útlond.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Jóhannes Færø formaður	Olaf Frits Joensen næstformaður	Fróði Sivertsen peningarøkil	Alvi Nielsen skrivari